# Kunnu útflyta fyri 300 milliónir um árið

**Nýtt virki í Leirvík skal nú eisini vinna gelatinu og peptonir, burtur úr fiskaryggjum og skræðu. Møguleikarnir eru ógvuliga stórir, sigur Egil Olsen, stigtakari**

NÝGGJ VINNA
*Áki Bertholdsen*

*Í løtuni verður ein stórur partur av hvørjum einasta fiski í flestu førum tveitt burtur, ella brúkt til vørur, sum ikki kosta serliga nógv. Men verða møguleikarnir útnytttaðir, ber til at skapa útflutning fyri einar 300 milliónir, bara burturúr skræðu, ryggjum og livur, sigur Egil Olsen, sum er ein av stigtakarunum til nýggja virkið í Leirvík*






*Her er eitt úval av teimum vørum, har evni, sum ætlanin er at framleiða á nýggja virkinum í Leirvík, verða brúkt í.*

Herfyri skrivaðu vit í Sosialinum um eitt nýskapandi virkið, sum Egil Olsen og aðrir ætlaðu at byggja í Leirvík og sum skuldi gagnnýta livrina úr tí fiskinum, sum verður fiskaður undir Føroyum.

Ætlanin við virkinum var at vinna lýsi burturúr livrini og tað, sum síðani var eftir, skuldi malast til mjøl.

Tað eru Faroe Marine Biotech, sum Egil Olsen er stjóri ið, sum byggir virkið saman við útlendingum. Útlendingar og føroyingar eiga hvør sína helvt í virkinum.

Men nú er greitt, at ætlanin er gera virkið størri, so at tað eisini skal gera mineralur, gelatinu og peptonir, sum er eitt slag av proteinum, burturúr fiskaslógvi.

Umframt at taka ímóti livur, sum upprunaliga ætlað, skal virkið sostatt eisini taka ímóti fiskaskræðu og fiskaryggjum.

Av tí at ætlanin er víðkað, verður eisini talan um heilt aðrar upphæddir, sum teir arbeiða við.

Egil Olsen sigur, at sostatt verður íløgan í virkið ikki 10 milliónir, sum upprunaliga ætlað, men heldur 20 milliónir. Bygningurin kostar einar fimm milliónir og rakstrargøgnini einar 15.

Samstundis koma eini 10-20 fólk at arbeiða á virkinum ístaðin fyri 6-10, sum upprunaliga ætlað. Tey verða at kalla øll starvsfólk við tekniskum og biokemiskum útbúgvingum.

Men ein slík ætlan krevur eisini fígging og í tí sambandi er ætlanin at hækka partapeningin, sum er 1.325.000 krónur, upp í tríggjar milliónir, men kursurin í nýggja partapeninginum verður yvir 100, so kapitalinnskotið verður munandi størri. Málið hjá teimum er, at helvtin av íløguni skal fíggjast við partapeningi.

Ætlanin er at virkið skal lata upp í vár ella tíðliga í summar.

Útlendska partin í virkinum eiga íslendska fyritøkan Lysi og norska fyritøkan Maritex,sum báðar eru serkønar á økinum frammanundan.

Føroyska felagið, Faroe Marine Biotech, samstarvar frammanundan við Lysi og Maritex. Annars eru menninir aftanfyri høvdavirkið í Lorvík við í ætlanini at byggja nýggja virkið í Leirvík, umframt Kovin í Sandavági og ymsir rávøruútvegarar.

Nýggja virkið kemur at eita Fomega.

– Orsøkin til, at vit víðkað virkið, er í fyrstu atløgu, at virkið fær fleiri bein at standa á og tað er ein fíggjarligur fyrimunur.

– Men gera vit alt í einum, er tað munandi rationellari, tí nógv av útgerðini gongur aftur í teimum ymsu framleiðslunum og á hendan hátt sleppa vit undan at gera somu íløgur í útbúnað og bygningar fleiri ferðir og tí er hetta at útnytta íløguna nógv betri.

### Stór virðisøking

Egil Olsen sigur, at hetta er ein roynd at fáa nakað burturúr einun parti av fiskinum, sum annars verður tveittur fyri borð aftur.

Sjálvur hevur hann verið av ídnastu talsmonnum fyri at vit skulu royna at fáa meiri burturúr fiskiríkidøminum undir Føroyum, ikki minst tí partinum, sum annars ikki verður gagnnýttur.

Hann sigur, at gangnýta vit ikki allan fiskin, sum hann er, fara stór samfelagslig virði fyri skeyti.

Og góðskingarvirkið, sum nú skal byggjast í Lorvík, er fyrsta veruliga stigið til at skapa samfelagvirði burturúr tilfari, sum annars fyri mesta partin fer fyri skeyti.

Burturúr skræðuni verður gelatina vunnin. Gelatina verður brúkt í nógvari framnleiðslu, eitt nú filmi til myndatøku, leðuri, men eisini er gelatina í hylkjunum, sum nógvur heilivágur er í.

Burturúr rygginum verða vunnin peptonir og mineralir, sum verða brúktar sum ískoyti til heilsukosti og annað.

### Stórir møguleikar

Egil Olsen sigur, at teir vænta sær heilt fitt av virksemi á virkinum, tí tað eru stórir møguleikar í at gagnýta tann partin av fiskinum, sum ikki verður brúktur í dag.

– Eini 8-10% av fiskinum er livur. Tað merkir, at tilsamans kunnu vit fáa eini 8000-10.000 tons av livur burturúr tí fiski, sum verður fiskaður undir Føroyum.

Men Egil Olsen sigur, at teir vóna at fáa 3.000 tons av livur, í fyrsta umfari í hvussu so er.

Ætlanin er eisini at lata skipunum ein prís fyri livrina sum helst skuldi gjørt tað áhugavert hjá teimum av fingið livrina til høldar og avreitt hana.

– Vit ætlað at lata fýra krónur fyri kilo av livur. Men fáa vit møguleikan at byggja virkið upp sum vit vóna, ivast vit onga løtu í, at prísurin fer at hækka bæði eina og tvær krónur, ella kanska enntá meiri, sigur hann.

Hvussu nógv, teir kunnu keypa ryggir og skræðu fyri, veit hann ikki enn.

Hann sigur, at av teimum 3.000 tonsunum av livur, teir vóna at fáa, fara eini 20%, ella 600 tons til Sandavágs at verða niðursjóðað.

Burturúr restini, sum eru eini 2.400 tons, fara teir at fáa góð 1.200 tons av lýsi og góð 500 tons av mjøli.

Teir vænta at fáa eini 11 krónur fyri kilo av lýsi og einar fimm ella seks krónur fyri kilo av mjøli, tá ið tað verður selt á marknaðinum

Hann vónar sostatt, at hetta er nóg mikið til at skipini verða sinnað at taka livrina til høldar.

### Sera góður prísur

Eini 5-7% av fiskinum er skræða og gelatinu-úrtøkan burturúr skræðuni er eini 10%.

Egil Olsen sigur, at hvat gelatinu viðvíkur eru fjareystur og USA mest áhugaverdu marknaðirnar og í fjareystri eru mineralur trotvøra. Marknaðurin fyri peptonum er ógvuliga stórur, tí tað verður brúkt í nógvum øðrum framleiðslu.

– Kemur alt til høldar, ber til at gera eini 300 tons av gelatinu um árið burturúr tí fiski, sum verður avreiddur í Føroyum.

Og prísurin er góður, heilar 200 krónur kilo. Sostatt ber til at skapa eitt útflutningsvirði uppá heilar 60 milliónir krónur, bara burturúr skræðuni, sum í dag verður næstan ikki kemur til høldar.

Hinvegin eru eini 12-15% av einum fiski ryggir. Sostatt ber til at fáa eini 7.500 tons av ryggjum. Úrtøkan av peptonum og mineralum burturúr ryggjunum er eini 25% og tað ber sostatt til at fáa eini 1.900 tons av peptonum og mineralum burturúr ryggjunum.

Av teimum eru eini 1.400 tons peptonir, sum verða seld fyri 85 krónur kilo. Virðisskapanin verður sostatt 120 milliónir.

Eini 500 tons eru mineralur, sum ganga í 65 krónur fyri kilo. Sostatt ber til at útflyta mineralir fyri yvir 30 milliónir.

Livurin, sum fæst úr fiskinum, sum fæst undir Føroyum, er verd einar 100 milliónir, verður hon gagnnýtt, øll, sum hon er.

– Tilsamans ber tað sostatt til at skapa eitt virði upp á 300 milliónur, bara burturúr livrini, ryggjunum og skræðuni.

– Hetta sigur eitt sindur um tey virði, sum fara fyri skeyti, og um teir møguleikar, sum hetta nýggja virkið hevur, verður tað útbygt til fulnar, sigur Egil Olsen.

Hvussu nógv, virkið í Lerivík, fer at fáa av rávøru, er ilt at siga. Tað veldst m.a, um, hvussu nógvur fiskur verður útflutt heilur.Men tað skerst ikki burtur, at hvørja ferð, ein fiskur verður útfluttur heilur, fara stór samfelagslig virði fyri skeyti, sigur Egil Olsen.

Hann heldur ikki, at samfelagið kann góðtaka, at ein stórur partur av okkara fiskatilfeingi, verður tveitt fyri borð aftur, tá ið tað annars kundi verðið gagnnýtt, so hann vónar, at skip og virki fara at verða eggjað til at taka livur, ryggir og skræðu, so at tað kann verða gagnnýtt.

Hann sigur, at av teimum 3.000 tonsunum av livur, teir vóna at fáa, fara eini 20%, ella 600 tons til Sandavágs at verða niðursjóðað.

Burturúr restini, sum eru eini 2.400 tons, fara teir at fáa góð 1.200 tons av lýsi og góð 500 tons av mjøli.

Teir vænta at fáa eini 11 krónur fyri kilo av lýsi og einar fimm ella seks krónur fyri kilo av mjøli, tá ið tað verður selt á marknaðinum

– Ætlanin er, at virkið í Lorvík og tey útlendsku virkini, Maritex og Lysi, skulu samstarva um søluna, so at hon verður samskipað við tí endamáli at fáa sum mest burturúr. Keypararnir kunnu teljast á aðrari hondini og fyri at fáa nakað burturúr, verður neyðugt at samskipa søluna.




*Hendan talvan vísir ymisk evni, sum kunnu vinnast burturúr ymsum pørtum av fiskinum*



# Eingin kringvarpsskattur, men kortini meira pengar til SvF

**Annlis Bjarkhamar, landsstýrismaður í mentamálum, hevur nú endaliga slept ætlanini um at áseta eitt kringvarpsgjald. Arbeitt verður í staðin við tvinnanda loysnum: antin at strika meirvirðisgjaldið av hyggjara- og lurtaragjaldinum, ella at hækka hyggjaragjaldið. Tí sjópvarpið má fáa meira pengar næsta ár, slær landsstýrismaðurin fast.**

LOFTMIÐLAR
*Jón Brian Hvidtfeldt*



*- Kanska var tað nakað naivt av mær at halda, at eg fór at fáa breiða undirtøku fyri kringvarpsgjaldinum, sigur Annlis Bjarkhamar, sum nú hevur slept ætlanini.*

Undirtøka var ikki í samgonguni fyri uppskotinum hjá Annlis Bjarkhamar, landsstýrismanni í mentamálum, um at áseta eitt kringvarpsgjald, ið skuldi krevjast inn umvegis skattin, í staðin fyri verandi lurtara- og hyggjaragjøld. Hetta staðfestir landsstýrismaðurin, og tí kemur einki uppskot frá henni um at áseta nakað kringvarpsgjald.

- Eg má bara staðfesta, at tað bar ikki til at fáa semju fyri uppskotinum í samgonguni, og tí er ætlanin slept, í øllum føri fyribils, sigur Annlis Bjarkhamar.

Rættuliga skjótt eftir at landsstýrismaðurin kom við uppskotinum gjørdist greitt, at undirtøkan millum samgongulimir var ivasom. Millum annað segði Anfinn Kallsberg, løgmaður, at hann í sínum grundsjónarmiði var ímóti kringvarpsgjaldinum, tí talan í veruleikanum var at »uppfinna« ein nýggjan skatt at leggja á fólkið. Eisini førdi løgmaður fram, at eftir hansara tykki var tað ein skeiv gongd at flyta ymiskar almennar skipanir, tænastur og tilboð yvir í skattaskipanini og harvið skattarokningina hjá fólki.

Hóast uppskotið hjá landsstýrismanninum síðan hevur fingið tunnilin niðureftir hjá pørtum av samgonguni, følir Annlis Bjarkhamar tó ikki, at samgongan hevur vent henni bakið.

- Øll vóru samd um, at serliga sjónvarpinum tørvaði pengar, og tí royndi eg at koma við eini loysn, ið kanska var eitt sindur øðrvísi. Eisini legði eg meg eftir at fáa breiða semju fyri hesi loysnini, men kanska var tað eitt sindur naivt av mær, leggur Annlis Bjarkhamar afturat.

### Finna aðra loysn

Hóast undirtøka ikki fekst fyri ætlanin við kringvarpsgjaldinum, ið sambært landsstýrismanninum skuldi geva sjónvarpinum nakrar milliónir í inntøku afturat um árið, so hevur Annlis Bjarkhamar slept málinum um at víðka fíggjarligu karmarnar hjá Sjónvarp Føroya, longu næsta ár.

Landsstýrismaðurin arbeiðir í løtuni við tvinnanda loysnum. Fyri tað fyrsta ber til at hækka sjónvarpsgjaldið. Tað kann landsstýrismaðurin gera við kunngerð. Hin møguleikin er at frítaka sjónvarps- og útvarpsgjaldið fyri meirvirðisgjaldinum, so allir pengarnir enda hjá stovnunum sjálvum. Samgongan hevur sett sær fyri ikki at fremja fleiri undantøk í MVG-lógini, men kortini metir Annlis Bjarkhamar, at hetta eigur at vera ein møguleiki. Hon vísir á, at t.d. eru bløð og bøkur frítikin fyri meirvirðisgjaldi, og tí eigur at bera til, eisini at frítaka útvarp og sjónvarp frá meirvirðisgjaldinum.



*Endamálið við kringvarpsgjaldinum var at útvega Sjónvarpinum meira pengar. Hóast landsstýrismaðurin í mentamálum ásannar, at meiriluti ikki fæst fyri uppskotinum, so hevur hon ikki slept málinum, ið er at útvega Sjónvarpinum meira pengar, longu næsta ár.*

Í ár er inntøkan hjá Útvarpinum og Sjónvarpinum frá lurtara- og hyggjargjaldinum 16,7 milliónir krónur fyri hvønn stovnin, ella tilsamans 33,4 milliónir krónur. Tað merkir, at stovnarnir tilsamans rinda 8,3 milliónir í meirvirðisgjaldi av lurtara- og hyggjaragjaldinum. Annlis Bjarkhamar sigur, at verður loysnin tann, at stovnarnir sleppa undan at rinda hesar pengarnar í MVG, so verður ein býtislykil gjørdur, so sjónvarpið fær størra partin av pengunum. Samtíðis er greitt, at landskassin so missir hesa MVG-inntøku frá almennu loftmiðlunum.

Hin møguleikin er at hækka sjónvarpsgjaldið. Annlis Bjarkhamar sigur, at enn hevur hon ikki tikið endaliga støðu til, hvussu nógv gjaldið kundi hækkað, men hon kundi hugsað sær, at tað hækkaði umleið 500 krónur. Ein tílík hækking er neyðug, skal tað gera nakran veruligan mun hjá stovninum, vísir landsstýrismaðurin á.

Annlis Bjarkhamar sigur, at í løtuni verður uppskotið viðgjørt í samgonguni. Tí er ov tíðliga at siga, hvat endaliga loysnin verður, ella um undirtøka er fyri uppskotunum. Landsstýrismaðurin í mentamálum hevur tó sett sær fyri at avgreiða málið rættuliga skjótt.

- Hóast undirtøka ikki fekst fyri ætlanini við kringvarpsgjaldinum, so ætli eg framvegis at útvega sjónvarpinum meira pengar næsta ár, og tí hevur málið skund, sigur Annlis Bjarkhamar.

Landsstýrismaðurin leggur afturat, at hon er ímóti at eitt nú Sjónvarpið, har tørvurin á meira pengum er størstur, kemur á fíggjarlógina. Tí tá er vandi fyri, at politikarar fara at blanda seg uppí, hvat fyriferst á stovninum, sigur Annlis Bjarkhamar.

Annlis Bjarkhamar sigur, at hon framvegis arbeiðir við at fáa sett eina felags nevnd fyri sjónvarpið og útvarpið, sum skal virka sum millumlið millum politiska myndugleikan og stjórarnar á almennu loftmiðlunum.

# Eingir pengar til bjálving

**Tað nyttar lítið hjá pensjónistum at søkja um bjálvingarstuðul, ynskja teir at umvæla síni hús. Bjálvingargrunnurin er langt síðan tómur, og Húsalánsgrunnurin, sum umsitur grunnin, hevur nærum 50 ferðir verið noyddur at vísa umsøknum frá sær, tí eingir pengar eru at taka av.**

BJÁLVING
*Jón Brian Hvidtfeldt*



*Seinnu árini hava pen sjónistar havt møguleika at søkja um bjálvingarstuðul. Men Bjálvingargrunnurin er tómur, og tí hava útvið 50 umsøknir um stuðul fingið noktandi svar, higartil í ár, tí eingir pengar eru at taka av.*

Seinnu árini hevur Bjálvingargrunnurin verið ein góðum møguleiki hjá pensionistum, tá tey hava skula umvælt og bjálvað sær húsini. Grunnurin hevur latið upp til 80.000 krónur í rentu- og avdráttarfríum láni til at bjálva húsini, m.a. at skifta vindeygu, klædning ella tak. Hesin møguleiki hevur givið pensjónistum, ið kanska ikki hava so nógvar pengar um hendi, ein møguleika at bøta um tíðum gomlu og lítið bjálvaðu hús teirra. Skipanin virkar á tann hátt, at lánið fellur ikki til gjaldingar, fyrr enn pensjónisturin er farin úr húsunum, antin á ellis- og røktarheim, ella er deyður.

Av tí at tørvurin hevur verið stórur, og tað tíðum hevur gingið leingi frá at pengarnir eru latnir úr Bjálvingargrunninum, til teir koma innaftur, hava undanfarin ár pengar verið settir av á fíggjarlógini. Seinast var í 2000, tá stívliga sjey milliónir krónur vóru settar av til bjálvingarstuðul, umframt tvær milliónir krónur til orkusparandi tiltøk, tvs. pengar til at skifta hitaketil, oljufýr, oljutanga, komfýr osv.

Men síðan hevur grunnurin onga játtan fingið, og tíðliga í ár var grunnurin tómur. Jóannes Dalsgarð, stjóri í Húsalánsgrunninum, sum umsitur Bjálvingargrunnin, sigur, at umsøknir, sum annars lúka treytirnar, eru gingnar á møti, so leingi pengar vóru í grunninum, men tá eingir pengar vóru eftir, bar ikki til at játta bjálvingarstuðul. Tó er so, at um játtanin av einhvørjari orsøk ikki er brúkt eftir hálvum ári, fellur hon aftur í Bjálvingargrunnin, og tað gevur rúmd fyri at ganga aðrari umsøkn á møti. Jóannes Dalsgarð sigur, at onkur umbøn var gingin á møti tíðliga í ár, men í langa tíð hevur ikki borið til at játta pengar úr grunninum.

### Noktandi svar

Vanliga fær Bjálvingargrunnurin millum 100 og 120 umsøknir um stuðul árliga, men í ár hevur talið verið nakað lægri. Ein uppgerð vísir, at til og við september mánað høvdu 38 umsøknir um bjálvingarstuðul fingið noktandi svar, tí ongir pengar eru tøkir. Og ein meting hjá Húsalánsgrunninum sigur, at væntandi eru umleið 10 umsøknir um stuðul komnar afturat, tá árið er av.

Spurningurin er so, hvørt fólk lata vera við at søkja, tí tey frammanundan vita at eingir pengar eru at tøkir, ella tí at komið er so langt við at bjálva gomlu húsini, at tørvurin á Bjálvingargrunninum er minkandi.

### Flytast yvir í Húsalánsgrunnin

Í Trivnaðarmálaráðnum verður arbeitt við at broyta lógina, so Húsalánsgrunnurin sjálvur skal fíggja bjálvingarstuðulin, heldur enn at lata pengar úr landskassanum. Men einki uppskot er tó á veg enn, og tískil mugu pensjónistar, ið kundu hugsað sær at søkt um bjálvingarstuðul, brynja seg við toli.

Jóannes Dalsgarð, stjóri í Húsalánsgrunninum, sigur, at tað er ein politiskur spurningur, hvørt man ynskir at Húsalánsgrunnurin skal fíggja Bjálvingargrunnin. Hann vísir tó á, at meðan bjálvingarstuðulin er eitt rentu og avdráttarfrítt lán, ofta í nógv ár, skal Húsalánsgrunnurin tryggja sær, at pengarnir, ið grunnurin lænir, koma innaftur og helst forrenta seg eftir ávísum áramáli.

Skuldu tær 48 umsøknirnar um bjálvingarstuðul, ið væntandi eru komnar við árslok, verið gingnar á møti, hevði tað »kostað« 3,8 milliónir krónur. Eins og í ár og í fjør eru heldur eingir pengar settir av á fíggjarlógaruppskotinum fyri 2003 til Bjálvingargrunnin.